# Eldgos

Rithøvundur og myndprýðari: Rán Flygenring (Ísland)
Angústúra (2022)

Í uppskoti til Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2023

Søgugongd: Søgan fer fram í Íslandi og snýr seg um dreingin Kaktus. Í skúlanum fer ein lúsafarsótt fram. Mamman vil ikki hava, at Kaktus fær lús, og tí má hann koma við mammuni til arbeiðis. Mamma Kaktus starvast sum ferðaleiðari og skal á útferð saman við einum útlendskum ferðaliði at uppliva náttúruna. Hetta heldur Kaktus ikki vera serliga spennandi. Hann vil sleppa at síggja okkurt ordiliga spennandi – og tað sleppur hann eisini, enntá sum tann fyrsti av øllum. Hann upplivir nevniliga eitt eldgos! Í kikaranum sær hann eisini nakað annað. Men hvønn leiklut spælir lúsin í søguni?

Evni: Ísland, ferðafólk, eldgos, kenslur, spenningur, skemt




## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES saman við teimum allaryngstu

**Hyggið at myndunum saman. Hvat síggja tit? Hvat gera menniskjuni? Hvørji djór síggja tit?**

### TEY YNGRU

**1. Hyggið at permuni. Hvat halda tit, bókin snýr seg um?**

**2. Hava tit sæð myndir av eldgosi? Eru gosfjøll, har tit búgva? Tekna eitt eldgos.**

**3. Hyggið at myndunum. Hvørji djór finna tit í bókini? Hava tit sæð hesi djórinim har tit búgva?**

**4. Hyggið at myndunum. Hvat ger lúsin?**

**5. Hevur tú verið við mammu ella babba til arbeiðis? Hvat slapst tú at gera har? Var tað spennandi?**

**6. Gerið kikarar burturúr vesirullum og farið á útferð í náttúruni. Hvat síggja tit?**

### MIÐLINGAR

**1. Hvat halda tit um permuna? Hvønn leiklut spæla litirnir?**

**2. Í bókini eru nógv ferðafólk. Hvat er eitt ferðafólk? Hvat gera tey? Hava tit nakrantíð verið ferðafólk í tykkara heimlandi ella í øðrum londum?**

**3. Nógv ferðafólk gera ymiskt nærhendis eldgosinum. Hvat gera tey? Halda tit, at mann kann gera hvat sum helst nærhendis einum gosfjalli, sum spruttar av lava?**

**4. Í hvørjum londum finnast gosfjøll? Er tað vandamikið at búgva í einum landi við gosfjøllum og eldgosi? Tosið saman um hetta.**

**5. Finnið eitt videoklipp á netinum av einum eldgosi. Gerið síðani tykkara egna eldgos. Tit finna vegleiðingar á netinum.**

**6. Teknið eitt gosfjall á eitt pappír í A4 støðd og skrivið eina yrking um eitt eldgos inni í gosfjallinum.**

**7. Rithøvundurin hevur fortalt, at hon er bergtikin av eldgosi. Hví er hon tað, heldur tú? Ert tú bergtikin av nøkrum?**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Hvat hildu tit um bókina? Var nakað, ið kendist torført? Finna tit mynstur og líkleikar við aðrar søgur?**

**2. Vel eitt ferðafólk í bussinum, sum tær dámar og fortel søguna úr hennara/hansara sjónarmiði.**

3. Hyggið at myndunum. Hví halda tit, at myndprýðarin hevur valt at myndprýða menniskjuni í svørtum og hvítum og náttúruna í litum?

4. Ímynda tær, at tú ert eitt av ferðafólkunum. Hvussu hevði tú víst upplivingarnar á sosialu miðlunum, um tú vart við á ferðini? Ger eina teknirøð, sum lýsir søgugongdina.

5. Rithøvundurin hevur samantvinnað fyribrigdi, sum menniskjan ikki hevur ræði á, nevniliga lúsasótt og eldgos. Dugir tú at gera eina yrking við at samantvinna hesi bæði fyribrigdini?

6. Hyggið eftir fakta um trý tey seinastu eldgosini í Íslandi og tosið saman um eldgos.

---

**LESIÐ EISINI:**

Naturen eftir Emma Adbåge.

Gouvssu guovssahasat eftir Karen Anne Buljo og Inga-Wiktoroia Påve.

---

## MÁLBITIN

# "Eldgos"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursámiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Vulkanutbrott** | **Vulkanudbrud** | **Vulkanutbrudd** | **Eldgos** | **Eldgos** | **Innermik anitsineq** | **Tulivuorenpurkaus** | **Dollavári russun** |



Deilið myndir av tykkara lesiløtum við **#nordiskabokslukaren**!